**Magni Laksáfoss**
**løgtingsmaður**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 17/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka**

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka**

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 um innflutning og sølu av rúsdrekka, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 64 frá 29. mai 2017 verða hesar broytingar gjørdar:

1. Í § 7, stk. 3 verður "av øli" strikað.
2. Í § 8, stk. 1 verður "av øli, sum í sær hevur hægst 5,8 rúmprosent av alkoholi" strikað.
3. Í § 8, stk. 2 verður "øli" broytt til: "egnari framleiðslu".
4. Í § 8, stk. 3, 2. pkt. verður "øli" broytt til: "egnari framleiðslu".

**§ 2**

Hendan løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Almennar viðmerkingar

Endamálið við hesum lógaruppskoti er at geva føroysku bryggjaríunum loyvi til at selja alla teirra framleiðslu í teirra sølubúðum.

Løgtingið hevur áður broytt rúsdrekkalógina, soleiðis at bryggjaríini kunnu bryggja sterkari øl og rúsdrekka. Henda liberaliseringin hevur givið hópin av nýggjum framleiðslum og hevur breiðkað vøruúrvalið munandi.

Bryggjaríini hava tó ikki møguleika fyri at selja allar teirra vørur í egnum sølubúðum, tí framvegis er mark á 5,8 rúmprosent av alkoholi.

Við hesi lógarbroyting fáa bryggjaríini møguleika fyri at selja allar teirra framleiðslur í egnum sølubúðum.

**Serligar viðmerkingar**
Til § 1, nr. 1-4. Við hesi broyting fáa føroysku bryggjaríini loyvi til at útflýggja alla teirra egnu framleiðslu, uttan mun til styrki, men tó við atliti til § 3, stk. 1, nr. 1 í lógini, ið ikki loyvir framleiðslu ella brygging av rúsdrekka við meira enn 60 rúmprosentum av alkoholi.

Til § 2. Gildiskomuáseting.

Á Løgtingi 10. september 2018

Magni Laksáfoss